UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 27. mai 2020
J.Nr.: 19/00159-6
(at tilskila í svari)

**(Uppskot til)**

**Kunngerð**
**um**
**at innflyta hundar, kettur og gitnaðarevni**

Við heimild í § 6, stk. 1, § 7, stk. 1, § 9, stk. 1 og stk. 2, nr. 1-3, § 12, stk. 1, § 13, stk. 1, § 14, stk. 1 og 2, § 16, stk. 1 og 2, § 17, § 20, stk. 1 og 2, § 39, stk. 1, § 41, stk. 2, § 42, stk. 1, § 46 stk. 1, § 48, stk. 2 og 3 og § 50, stk. 1 í løgtingslóg nr. 16 frá 23. februar 2001 um djórasjúkur (um fyribyrging og niðurberjing av sjúkum hjá djórum og um marknaeftirlit við djórum og djóraúrdráttum), § 1, stk. 1, § 3 stk. 1 og § 4 í løgtingslóg nr. 58 frá 22. apríl 2003 um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.ø. og í § 7, stk. 2, § 8, stk. 3, § 12, stk. 3, § 21, § 27 og § 30, stk. 6 í løgtingslóg nr. 49 frá 30. apríl 2018 um djóravælferð verður ásett:

## 1. kapittul
## Øki og allýsingar

**§ 1.** Í hesi kunngerð merkir:
1) Blendingsdjór (hybrid): Avkom undan tveimum ymiskum djórasløgum uttan mun til lutfall.
2) Djóraeigari: Tann, sum eigur hund, kettu ella gitnaðarevni, ið verður innflutt, og sum hevur ábyrgd av djórinum ella gitnaðarevninum.
3) Embætisdjóralækni: Annaðhvørt djóralækni á Heilsufrøðiligu starvsstovuni, ella ein djóralækni, sum er tilnevndur av og starvast hjá heimilaðum myndugleika í sendaralandinum.
4) Flutningseind: Flutningsfar, ið fysiskt flytur djór til Føroya.
5) Flutningsfelag: Løggilt felag, ið flytur djór til Føroya.
6) Framleiðslunummar: Batchnummar.
7) Fylgjari: Persónur, sum fylgir við hundi ella kettu, tá djórið verður flutt, og til djórið er handað djóraeigaranum. Fylgjarin hevur ábyrgd djóraeigarans eftir nr. 2, til djórið er handað djóraeigaranum.
8) Førarahundur: Hundur, sum er aldur og vandur til at hjálpa blindum ella sjónveikum.

GONGIN 7 • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN • TELEFON 30 66 60 • E-MAIL: UVMR@UVMR.FO

9) Gevaradjór: Djór, hvørs sáð, egg ella embryonir verða tikin at brúka til nøring.
10) Gitnaðarevni: Sáð, egg og embryonir.
11) Gjøgnumferð (transit): Ferðing við djóri millum tvey lond um eitt ella fleiri triðjalond.
12) Heilsuváttan: Skjal, sum váttar annaðhvørt heilsustøðuna hjá djóri, sum verður innflutt, ella gevaradjóri, sum hevur latið gitnaðarevni.
13) Ikki-loyvt hundaslag: Hundaslag ella blandingar av hundasløgum, sum ikki eru loyvd at innflyta til Føroya.
14) Innflutningsloyvi: Skjal, sum loyvir innflutningi av hundi, kettu ella gitnaðarevni.
15) Mikrosendari (mikrochip ella mikrotranspondari): Flís at eyðmerkja djór við.
16) Sendaraland: Landið, hvaðani djórið kemur til Føroya.
17) Skip: Øll før á sjónum, undir hesum ferðamannaskip, stuttleikabátar, trolarar o.a.
18) Stuðulshundur: Hundur, sum er aldur og vandur at hjálpa ella stuðla persóni við serligum tørvi.
19) Tænastuhundur: Hundur, sum er aldur og vandur til serliga nýtslu hjá t.d. politinum ella tollvaldinum.

## 2. kapittul
## Almennar ásetingar

**§ 2.** Loyvt er bara at innflyta hundar og kettur við galdandi innflutningsloyvi frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni og við galdandi heilsuváttan, sum er undirskrivað av løggildum djóralækna í sendaralandinum.

**§ 3.** Loyvt er bara at innflyta gitnaðarevni frá hundum og kettum við galdandi innflutningsloyvi frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni og við galdandi heilsuváttan fyri gevaradjórið og gitnaðarevnið, sum er undirskrivað av løggildum djóralækna í sendaralandinum.

**§ 4.** Tað er bannað at innflyta hundasløg, sum kunnu vera vandamikil fyri fólk ella djór. Forboðið fevnir um hundasløg, sum
1) upprunaliga eru ald til bardaga, varðhald, jakt ella verju,
2) hava eitt ágangandi ella tvísint sinnalag,
3) eru sterk ella harðfør,
4) kunnu vera fim ella smidlig, ella
5) hava aðrar óynsktar eginleikar.
*Stk. 2.* Uttan mun til lutfall er bannað at innflyta blandingar av hundasløgum, sum hava eginleikarnar, nevndir í stk. 1, nr. 1-5
*Stk. 3.* Bannað er at innflyta gitnaðarevni frá hundasløgum, sum hava eginleikarnar, nevndir í stk. 1, nr. 1-5.
*Stk. 4.* Landsdjóralæknin ger av, hvørji hundasløg eru fevnd av stk. 1.

**§ 5.** Tað er bannað at innflyta blendingsdjór og gitnaðarevni frá blendingsdjórum.

*Innflutningstreytir*

**§ 6.** Bara persónar, sum hava fastan bústað í Føroyum, og persónar, sum flyta til Føroya, kunnu innflyta hundar og kettur.

*Stk. 2.* Loyvt er bara at innflyta hundar ella kettur, um djóraeigarin ella ein fylgjari, ið hevur ábyrgd av djórinum, er ásettur. Viðkomandi skal fylgja við djórinum, meðan tað verður flutt.

*Stk. 3.* Loyvt er ikki at taka hundar ella kettur í land í Føroyum, sum eru fingin umborð á skip ella flogfør í útlondum. Manningin skal tryggja, at slík djór ikki koma í land, meðan skipið ella flogfarið er í Føroyum. Ásetingin er ikki galdandi fyri góðkendar flutningseindir hjá løggildum flutningsfelag.

*Stk. 4.* Loyvt er ikki at hava hund ella kettu við sær á gjøgnumferð um Føroyar til annað land.

*Ferðing*

**§ 7.** Loyvt er ikki at ferðast við hundi ella kettu til Føroya ella úr Føroyum, sbr. tó stk. 2-3.

*Stk. 2.* Uttan mun til ásetingarnar í stk. 1 og § 6, stk. 1 kunnu tænastuhundar, førararhundar og stuðulshundar ferðast til Føroya í tænastuørindum o.tíl. í upp í 2 mánaðir, um teir lúka treytirnar fyri innflutningi úr sendaralandinum. Í serligum føri, og tá bara eftir umsókn, kann landsdjóralæknin veita undantak frá hesi freist.

*Stk. 3.* Uttan mun til ásetingina í stk. 1 er loyvt at ferðast úr Føroyum við tænastuhundi, førarahundi og stuðulshundi í upp í 2 mánaðir. Hesir hundar skulu tó altíð lúka treytirnar fyri innflutningi úr ferðalandinum, bæði tá teir fara úr Føroyum, og tá teir koma aftur til Føroya.

*Stk. 4.* Ferðing við stuðulshundi, sbr. stk. 2-3, er treytað av, at hundurin hevur stuðulshundaprógv frá løggildum stað, og lækni váttar, at eigarin hevur tørv á stuðulshundinum.

*Stk. 5.* Loyvt er ikki at endurinnflyta hund ella kettu, sum djóraeigarin ella onnur hava tikið við sær av landinum í ferðaørindum.

## 3. kapittul
## Treytir fyri at innflyta hundar og kettur

*Umsókn o.a.*

**§ 8.** Skrivlig umsókn um innflutningsloyvi, saman við kravdum váttanum, skal verða Heilsufrøðiligu starvsstovuni í hendi í seinasta lagi seks yrkadagar fyri, at ætlaða ferðin til Føroya byrjar.

*Stk. 2.* Skrivlig umsókn um innflutningsloyvi fyri hund og kettu úr landi, sum ikki er nevnt í skjali 1, skal vera Heilsufrøðiligu starvsstovuni í hendi í seinasta lagi fýra vikur fyri, at ætlaða ferðin til Føroya byrjar.

*Innflutningur úr londum í flokki A*

**§ 9.** Hundar og kettur, sum skulu innflytast til Føroya úr landi í flokki A, sbr. skjal 1, skulu hava verið í sendaralandinum ella øðrum landi í flokki A í minsta lagi seks mánaðir fyri, at ferðin til Føroya byrjar.

*Stk. 2.* Hundar og kettur, sum skulu innflytast til Føroya úr landi í flokki A, kunnu bert flytast til Føroya beinleiðis úr sendaralandinum ella um annað land í flokki A.
*Stk. 3.* Eru hundahvølpar og kettlingar yngri enn seks mánaðir, kunnu teir innflytast til Føroya, um teir, eftir at teir vórðu lagdir, bara hava verið í sendarlandinum ella øðrum landi í flokki A.
*Stk. 4.* Uttan mun til ásetingina í stk. 2 kunnu hundar og kettur flytast um land í flokki B. Djórini skulu tá lúka treytirnar fyri innflutningi frá landi í flokki B.
*Stk. 5.* Hundar og kettur, sum innan fyri seinastu seks mánaðirnar fyri, at tey verða innflutt til Føroya, hava verið í landi, sum ikki er nevnt í skjali 1, skulu, uttan mun til sendaraland, lúka tær treytir, sum landsdjóralæknin setir eftir § 40, stk. 3.

*Innflutningur úr londum í flokki B*

**§ 10.** Hundar og kettur, sum skulu innflytast til Føroya úr landi í flokki B, sbr. skjal 1, skulu hava verið í sendaralandinum ella øðrum landi í flokki A ella B í minsta lagi seks mánaðir fyri, at ferðin til Føroya byrjar.
*Stk. 2.* Hundar og kettur, sum skulu innflytast til Føroya úr landi úr flokki B, kunnu bert flytast til Føroya beinleiðis úr sendaralandinum ella um annað land, sum er nevnt í flokki A ella B.
*Stk. 3.* Hundar og kettur, sum innan fyri seinastu seks mánaðirnar fyri, at tey verða innflutt til Føroya, hava verið í landi, sum ikki er nevnt í skjali 1, skulu, uttan mun til sendaraland, lúka tær treytir, sum landsdjóralæknin setir eftir § 40, stk. 3.

*Innflutningur úr øðrum londum*

**§ 11.** Hundar og kettur, sum skulu innflytast til Føroya úr landi, sum ikki er nevnt í skjali 1, skulu lúka tær treytir, sum landsdjóralæknin setir eftir § 40, stk. 3.
*Stk. 2.* Ikki er loyvt at innflyta gitnaðarevni frá hundum og kettum úr londum, sum ikki eru nevnd í skjali 1.

*Innflutningur úr landi ella øki við veterinerum avmarkingum*

**§ 12.** Ikki er loyvt at innflyta hundar ella kettur úr landi ella øki, har tað vegna smittandi djórasjúku eru ásettar veterinerar avmarkingar.
*Stk. 2.* Ikki er loyvt at innflyta hundar ella kettur, sum seinastu seks mánaðirnar fyri, at tey verða innflutt til Føroya hava verið í landi ella øki, har tað vegna smittandi djórasjúku eru ásettar veterinerar avmarkingar.
*Stk. 3.* Í heilt serligum føri kann landsdjóralæknin geva undantak frá ásetingunum í stk. 1 og 2.

*Eyðmerking*

**§ 13.** Hundar og kettur, sum verða innflutt til Føroya, skulu vera týðiliga eyðmerkt. Eyðmerkingin skal vera ein mikrosendari undir skinninum, sum lýkur ISO-standard 11784, sum brúkar HDX ella FDX-B tøkni, og sum kann lesast við einum tóli, sum samvirkar við ISO-standard 11785.
*Stk. 2.* Eyðmerkingarnummarið skal verða skrivað á umsókn um innflutningsloyvi, innflutningsloyvið og heilsuváttanina.

*Koppsetingar til hundar*

**§ 14.** Hundar, sum skulu innflytast til Føroya, skulu vera koppsettir fyri:

1) Canine parainfluenzavirus,
2) Canine parvovirus
3) Hundasjúku (Canine distemper),
4) Hundaøði (Rabies),
5) Livrasótt (Infectious canine hepatitis), og
6) Leptospirosu (Leptospirosis).

*Koppsetingar til kettur*

**§ 15.** Kettur, sum skulu innflytast til Føroya, skulu vera koppsettar fyri:

1) Feline calicivirus,
2) Feline leukaemia virus,
3) Feline viral rhinotracheitis,
4) Kettusjúku (Feline panleukopenia), og
5) Hundaøði (Rabies).

*Koppseting*

**§ 16.** Koppsetingar, nevndar í §§ 14-15, skulu vera gjørdar sambært tilráðing frá tí, ið hevur framleitt koppingarevnið. Koppsetingarnar skulu vera í minsta lagi fýra vikur gamlar, tá ið djórið kemur til Føroya.

*Stk. 2.* Verða endurkoppsetingar fyri sjúkur, nevndar í §§ 14-15, gjørdar sambært tilráðing frá tí, ið hevur framleitt koppingarevnið, kann djórið innflytast beint eftir endurkoppsetingina.

*Stk. 3.* Hundahvølpar og kettlingar skulu í minsta lagi vera 12 vikur gamlir, tá ið teir verða koppsettir sbrt. §§ 14-15. Hundahvølpar og kettlingar kunnu ikki innflytast til Føroya fyrr enn í fyrsta lagi fýra vikur eftir seinastu kravdu koppseting.

*Stk. 4.* Í umsókn um innflutningsloyvi skulu standa heiti og framleiðslunummar á koppingarevni, koppsetingardagur og gildi á øllum kravdum koppsetingum. Er talan um endurkoppseting, skal koppsetingardagur og gildi fyri seinastu koppseting eisini standa í umsóknini. Upplýsingarnar í umsóknini skulu váttast av løggildum djóralækna í sendaralandinum.

**§ 17.** Í heilt serligum føri kann landsdjóralæknin eftir ítøkiliga váðameting veita undantak frá koppsetingarkrøvunum í §§ 14 - 15. Skrivlig umsókn um undantaksloyvi skal latast Heilsufrøðiligu starvsstovuni samstundis sum umsókn um innflutningsloyvi.

*Stk. 2.* Í heilt serligum føri, og tá bara eftir umsókn, kann Heilsufrøðiliga starvsstovan loyva, at hundahvølpur, ið er yngri enn 3 mánaðir og sum ikki er koppsettur, kortini kann verða innfluttur, treytað av, at hundurin skal brúkast sum tænastuhundur. Loyvið er harumframt treytað av, at:

1) Hundahvølpurin kemur úr einum landi úr flokki A,
2) hundahvølpurin verður fluttur inn frá staðnum, har hann er lagdur,
3) hundahvølpurin ikki hevur havt samband við villini djór, og

4) hundahvølpurin lýkur treytirnar § 2, §§ 13-14 og §§ 19-20.

*Serligar treytir fyri innflutning úr londum í flokki B viðvíkjandi hundaøði*

**§ 18.** Fyri hundar og kettur, sum verða innflutt úr landi í flokki B, sbr. skjal 1, skal ein neutraliserandi andevnistitrering fyri hundaøði gerast á eini ES-góðkendari kanningarstovu. Kanningin skal geva eitt úrslit upp á minst 0,5 IE/ml og skal verða gjørd av eini blóðroynd, ið ein løggildur djóralækni í sendaralandinum hevur tikið í minsta lagi fýra vikur eftir koppsetingina.

*Stk. 2.* Hundar og kettur, ið verða innflutt úr landi í flokki B, kunnu ikki flytast inn fyrr enn 12 vikur eftir, at blóðroyndin eftir stk. 1 er tikin, og tá bara um úrslitið av blóðroyndini er nøktandi.

*Stk. 3.* Verður endurkoppseting gjørd til tíðina, t.e. sambært tilráðing frá tí, ið hevur framleitt koppingarevnið, og er úrslitið av blóðroyndini frá undanfarnu koppseting í samsvari við kravið í stk. 1, er ikki neyðugt við nýggjari kanning sbrt. stk. 1.

*Stk. 4.* Í umsókn um innflutningsloyvi skulu standa dagfestingin fyri blóðroyndini og úrslitið av kanningini. Upplýsingarnar skulu váttast av einum embætisdjóralækna í sendaralandinum.

*Sníkaviðgerð*

**§ 19.** Hundar og kettur, sum skulu innflytast til Føroya, skulu viðgerast fyri:

1) Bendilorm íroknað Ecchinococcus spp.,
2) loppu,
3) lús,
4) rundorm,
5) skógarmottu, og
6) skrubb.

*Stk. 2.* Hundar skulu eisini viðgerast fyri Franskan hjartaorm. Franskur hjartaormur skal viðgerast við tí evni, sum Heilsufrøðiliga starvsstovan ávísir.

*Stk. 3.* Viðgerðirnar, nevndar í stk. 1-2, skulu fyriskipast av løggildum djóralækna í sendaralandinum. Viðgerðirnar skulu ikki vera eldri enn 7 dagar, tá ferðin úr sendaralandinum byrjar.

*Stk. 4.* Navn á heilivági, virkin evni, skamtur og viðgerðardagur skulu standa í heilsuváttanini, sbr. skjal 6. Djóralæknin skal vátta upplýsingarnar í heilsuváttanini.

*Klinisk kanning*

**§ 20.** Hundar og kettur, sum skulu innflytast til Føroya, skulu kannast av løggildum djóralækna í sendaralandinum. Kanningin skal ikki vera eldri enn 2 dagar, tá ferðin úr sendaralandinum byrjar.

*Stk. 2.* Djóralæknin skal í heilsuváttanini vátta, at djórið ikki hevur klinisk tekin um smittandi sjúku, og at djórið er egnað til flutning millum lond.

**4. kapittul**
**Treytir fyri at innflyta gitnaðarevni**

*Umsókn o.a.*

**§ 21.** Skrivlig umsókn um innflutningsloyvi, saman við kravdum váttanum, skal vera Heilsufrøðiligu starvsstovuni í hendi í minsta lagi seks yrkadagar fyri, at ætlaður flutningur úr sendaralandinum byrjar.
*Stk. 2.* Saman við umsóknini um innflutningsloyvi skulu vera váttan frá djóreigara, koppsetingarváttan frá løggildum djóralækna í sendaralandinum og, um talan er um innflutning úr einum landi í flokki B, váttan frá embætisdjóralækna í sendaralandinum um neutraliserandi andevnistitrering fyri hundaøði.

*Innflutningur úr landi ella øki við veterinerum avmarkingum*

**§ 22.** Ikki er loyvt at innflyta gitnaðarevni frá hundi ella kettu úr landi ella øki, har tað vegna smittandi djórasjúku, eru ásettar veterinerar avmarkingar.
*Stk. 2.* Ikki er loyvt at innflyta gitnaðarevni frá hundi ella kettu, sum seinastu seks mánaðirnar fyri, at gitnaðarevnið verður tikið, hava verið í landi ella øki, har tað vegna smittandi djórasjúku eru ásettar veterinerar avmarkingar.
*Stk. 3.* Í heilt serligum føri kann landsdjóralæknin geva undantak frá ásetingunum stk. 1 og 2.

*Eyðmerking*

**§ 23.** Gevaradjór skulu vera týðiliga eyðmerkt. Eyðmerkingin skal vera ein mikrosendari undir skinninum, sum lýkur ISO-standard 11784 og sum brúkar HDX ella FDX-B tøkni, og sum kann lesast við einum tóli, sum samvirkar við ISO-standard 11785.
*Stk. 2.* Eyðmerkingarnummarið skal verða skrivað á umsóknina um innflutningsloyvið, á innflutningsloyvið og á heilsuváttanina.

*Koppseting*

**§ 24.** Gevaradjór skulu vera koppsett sbrt. §§ 14-15.
*Stk. 2.* Koppsetingarnar skulu gerast sambært tilráðing frá tí, ið hevur framleitt koppingarevnið. Koppsetingarnar skulu vera í minsta lagi fýra vikur gamlar, tá gitnaðarevnið verður tikið.
*Stk. 3.* Um endurkoppsetingar verða gjørdar sambært tilráðing frá tí, ið hevur framleitt koppingarevnið, kann gitnaðarevnið takast beint eftir endurkoppsetingina.

*Serligar treytir fyri innflutningi av gitnaðarevnum frá londum í flokki B*

**§ 25.** Fyri gitnaðarevni, sum verða innflutt úr londum í flokki B, sbr. skjal 1, skal ein neutraliserandi andevnistitrering fyri hundaøði gerast av gevaradjórinum á eini ES-góðkendari kanningarstovu. Kanningin skal geva eitt úrslit uppá minst 0,5 IE/ml og skal verða gjørd av eini blóðroynd, ið ein løggildur djóralækni í sendaralandinum hevur tikið í minsta lagi fýra vikur eftir koppsetingina.
*Stk. 2.* Gitnaðarevni, ið verða innflutt úr landi í flokki B, kunnu ikki takast fyrr enn 12 vikur eftir, at blóðroynd eftir stk. 1 er tikin, og tá bara um úrslitið av blóðroyndini er nøktandi.

*Stk. 3.* Í umsókn um innflutningsloyvi skulu standa dagfestingin fyri blóðroyndini og úrslitið av kanningini. Upplýsingarnar skulu váttast av einum embætisdjóralækna í sendaralandinum.

*Klinisk kanning*

**§ 26.** Í sambandi við, at gitnaðarevni verða tikin, skal løggildur djóralækni í sendaralandinum kanna gevaradjórið.
*Stk. 2.* Djóralæknin skal í heilsuváttanini vátta, at gevaradjórið ikki hevur klinisk tekin um smittandi sjúku.

## 5. kapittul
## Krøv til djóraeigaran

**§ 27.** Djóraeigarin skal tryggja sær, at djóraflutningurin fer fram í samsvari við ásetingarnar í løgtingslóg um djóravælferð, undir hesum eisini at flutningsbúr, flutningskassar o.tíl. lúka krøvini um luft, stødd, fóður, vatn o.tíl.

**§ 28.** Djóraeigarin hevur ábyrgdina av, at eitt galdandi innflutningsloyvi, sbr. skjali 7, sum er undirskrivað av einum embætisdjóralækna á Heilsufrøðiligu starvsstovuni, fylgir við djórinum.
*Stk. 2.* Í umsóknini skal upplýsast:
1) Navn, bústaður, teldupostur og telefonnummar djóraeigarans í Føroyum,
2) slag, ættarslag, føðingardagur, kyn og eyðmerkingarnummar á djórinum,
3) sendaraland, fráfaringarstaður, fráfaringardagur, fráfaringartíð og væntaður komudagur,
4) øll lond, sum djórið hevur verið í seinastu seks mánaðirnar,
5) ferðaleið, um djórið skal ígjøgnum fleiri lond, og
6) fyri djór, innflutt úr landi í flokki A, at djórið lýkur treytirnar í § 9, ella
7) fyri djór, innflutt úr landi í flokki B, at djórið lýkur treytirnar í § 10.

*Stk. 3.* Djóraeigarin skal í umsóknini, undir revsiábyrgd, vátta upplýsingarnar í stk. 2, nr. 1-7.
*Stk. 4.* Skrivlig umsókn um innflutningsloyvi skal vera Heilsufrøðiligu starvsstovuni í hendi í seinasta lagi seks yrkadagar fyri, at ferðin til Føroya byrjar.

**§ 29.** Djóraeigarin hevur ábyrgdina av, at ein galdandi heilsuváttan, sbr. skjal 6, fylgir við innflutta djórinum.
*Stk. 2.* Í heilsuváttanini skulu vera hesar upplýsingar:
1) Váttan frá løggildum djóralækna um, at djórið ikki hevur klinisk tekin um smittandi sjúku, og at tað er egnað til flutning millum lond,
2) váttan frá løggildum djóralækna um, at djórið hevur fingið allar kravdar viðgerðir fyri innansníkar og uttansníkar, og
3) um talan er um innflutning úr landi úr flokki B, sbr. skjal 1, váttan frá embætisdjóralækna um, at djórið ikki stavar frá einum øki, har tað vegna smittandi djórasjúku eru ásettar veterinerar avmarkingar.

*Stk. 3.* Heilsuváttanin skal ikki vera eldri enn 2 dagar, tá ið ferðin úr sendaralandinum byrjar.

**§ 30.** Djóraeigarin hevur ábyrgdina av, at eitt galdandi innflutningsloyvi, sum er undirskrivað av einum embætisdjóralækna á Heilsufrøðiligu starvsstovuni, fylgir við innfluttum gitnaðarevnum.
*Stk. 2.* Í umsóknini skal upplýsast:
1) Navn, bústaður, teldupostur og telefonnummar hjá tí, ið eigur gevaradjórið,
2) navn, bústaður, teldupostur og telefonnummar hjá tí, ið innflytur gitnaðarevnið,
3) slag, ættarslag, føðingardagur, kyn og eyðmerkingarnummar á gevaradjórinum,
4) slag av gitnaðarevni,
5) sendaraland,
6) øll lond, sum gevaradjórið hevur verið í seinastu seks mánaðirnar, og,
7) fyri gitnaðarevni úr landi úr flokki A, at gevaradjórið lýkur treytirnar í § 9 stk. 1, ella
8) fyri gitnaðarevni innflutt úr landi úr flokki B, at gevaradjórið lýkur treytirnar í § 10, stk. 1.
*Stk. 3.* Djóraeigarin skal í umsóknini, undir revsiábyrgd, vátta upplýsingarnar í stk. 2, nr. 1-8.
*Stk. 4.* Skrivlig umsókn um innflutningsloyvi skal vera Heilsufrøðiligu starvsstovuni í hendi í seinasta lagi seks yrkadagar fyri, at flutningurin til Føroya byrjar.

**§ 31.** Djóraeigari hevur ábyrgdina av, at heilsuváttan, sbr. skjal 10, fylgir við innfluttum gitnaðarevnum.
*Stk. 2.* Í heilsuváttanini skal løggildur djóralækni vátta, nær gitnaðarevni er tikið og at gevaradjórið ikki hevur klinisk tekin um smittandi sjúku. Harumframt skal gevaradjórið vera eyðmerkt.
*Stk. 3.* Heilsuváttanin skal gerast í sambandi við, at gitnaðarevnið verður tikið og skal ikki vera eldri enn tveir dagar, tá ið flutningurin úr sendaralandinum byrjar.
*Stk. 4.* Djóraeigarin skal vísa tollvaldinum galdandi innflutningsloyvi og heilsuváttan í sambandi við innflutning og tollavgreiðslu av gitnaðarevnum.

**§ 32.** Tá djórið kemur til Føroya, skal djóraeigarin sjálvboðin vísa tollmyndugleikanum ella Heilsufrøðiligu starvsstovuni innflutningsloyvi og heilsuváttan o.o. kravd skjøl.

## 6. kapittul
## Krøv til flutningsfeløg

**§ 33.** Flutningsfeløg, sum flyta hundar og kettur til og úr Føroyum, skulu annaðhvørt hava løggilding eftir § 6, sbr. fylgiskjal 1, art. 10, stk. 1, litra b og c, og art. 11, stk. 1, litra b, nr. iv, í kunngerð um vernd av djórum undir flutningi, ella hava samsvarandi løggilding frá skikkaðum útlendskum myndugleika. Flutningsfelagið skal harumframt lúka treytirnar í stk. 2-4 í hesi grein.
*Stk. 2.* Flutningsfeløg, sum flyta hund og kettu úr útlondum til Føroya, skulu tryggja sær, at galdandi innflutningsloyvi fylgir við djórinum, áðrenn ferðin úr sendaralandinum byrjar. Flutningsfelagið skal, sbr. skjal 7, vátta, at tað hevur tryggjað sær, at galdandi innflutningsloyvi fylgir djórinum.

*Stk. 3.* Er ivi um gildið á innflutningsloyvinum, ella vantar innflutningsloyvi, skal flutningsfelagið nokta at flyta djórið til Føroya.
*Stk. 4.* Flutningsfeløg, sum flyta hundar og kettur til Føroya, skulu á komustaðnum í Føroyum hava eina móttøkustøð til hundar og kettur.

*Flutningseindir og flutningsbúr*

**§ 34.** Flutningseindir og flutningsbúr, sum skulu nýtast at flyta hundar og kettur til og úr Føroyum, skulu lúka treytirnar í skjali 1, skjali 1, kap. II í kunngerð um vernd av djórum undir flutningi.
*Stk. 2.* Smærri djór skulu vera í flutningsbúri, ið er egnað til endamálið, um tey verða flutt í ferðafólkakabinuni á flogfari.

*Móttøkustøð*

**§ 35.** Flutningsfelagið hevur ábyrgdina av at reka eina móttøkustøð, undir hesum m.a. at syrgja fyri, at fólk er tøkt til at taka sær av djórunum. Heilsufrøðiliga starvsstovan skal góðkenna móttøkustøðina.
*Stk. 2.* Móttøkustøðin skal vera útgjørd við neyðugari og hóskandi útgerð til at kunna hýsa øllum innfluttum djórum í nakrar dagar.
*Stk. 3.* Kassar og búr á móttøkustøðini, sum eru ætlað til hundar og kettur, skulu m.a. tryggja, at djórini fáa nóg mikið av ljósi og frískari luft, og at djórini ikki sleppa út, fáa skaða ella skaða fólk ella djór.
*Stk. 4.* Kassar og búr skulu vera sterk og gjørd úr tilfari, ið er lætt at vaska og sóttreinsa og skulu hava eina hóskandi støðd. Kassar og búr, sum eru í fleiri hæddum, skulu hava tættan botn, soleiðis at land og skarn ikki lekur niður í kassarnar ella búrini niðriundir.

## 7. kapittul
## Eftirlit o.a.

**§ 36.** Tollmyndugleikin skal kanna, at innflutt djór hava galdandi innflutningsloyvi, heilsuváttan og møgulig onnur kravd skjøl við sær. Tolleftirlitið skal á innflutningsloyvinum vátta, at eftirlitið er framt, sbr. skjal 7. Eitt avrit av skjølunum skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni.
*Stk. 2.* Er ivi um gildið á innflutningsloyvinum, heilsuváttanini ella heilsustøðuna hjá djórinum, ella vanta innflutningsloyvi, heilsuváttan ella onnur skjøl, skal tollvaldið afturhalda djórinum og boða Heilsufrøðiligu starvsstovuni frá.

**§ 37.** Tollvaldið skal kanna, at galdandi innflutningsloyvi og heilsuváttan fylgir við innfluttum gitnaðarevnum. Tollvaldið skal á innflutningsloyvinum vátta, at eftirlitið er framt, sbr. skjal 11. Eitt avrit av skjølunum skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni.
*Stk. 2.* Er ivi um gildið á innflutningsloyvinum ella heilsuváttanini, ella vanta innflutningsloyvið ella heilsuváttan, skal tollvaldið afturhalda sendingini og boða Heilsufrøðiligu starvsstovuni frá.

**§ 38.** Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eftirlit við innflutningi av hundum og kettum.
*Stk. 2.* Heilsufrøðiliga starvsstovan kann gera skjalaeftirlit, eyðmerkingareftirlit og fysiskt eftirlit við hundum og kettum, sum verða innflutt til Føroya.
*Stk. 3.* Farast skal fram eftir reglunum í stk. 4, um
1) djórið hevur tekin um sjúku,
2) djórið ikki hevur galdandi innflutningsloyvi ella heilsuváttan við sær, ella
3) roynt verður at flyta djór inn uttan kravt innflutningsloyvi ella kravda heilsuváttan.
*Stk. 4.* Heilsufrøðiliga starvsstovan ger av, um neyðugt í samráð við embætisdjóralæknan, og, í tann mun tað er heilsufrøðiliga ráðiligt, við djóraeigaran ella fylgjaran, um djórið skal
1) kannast, koppsetast og viðgerast eftir leiðbeining frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni,
2) setast í sóttarhald undir eftirliti av Heilsufrøðiligu starvsstovuni og, um neyðugt, kannast, koppsetast og viðgerast fyri sníkar, til treytirnar fyri innflutningi eru loknar,
3) sendast aftur til sendaralandið, um so er, at veterineri myndugleikin í sendaralandinum gevur loyvi til tess, ella
4) verða avlívað.
*Stk. 5.* Eftir at brot á stk. 3 er staðfest, men áðrenn atgerðir eftir stk. 4 eru settar í verk, skal djórið verða sett í móttøkustøðina, sbr. § 35.

**§ 39.** Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eftirlit við innflutningi av gitnaðarevnum.
*Stk. 2.* Heilsufrøðiliga starvsstovan kann gera skjalaeftirlit, eyðmerkingareftirlit og fysiskt eftirlit við gitnaðarevnum, sum verða innflutt til Føroya.
*Stk. 3.* Farast skal fram eftir reglunum í stk. 4, um galdandi innflutningsloyvi ella heilsuváttan ikki fylgir við gitnaðarevninum, ella um roynt verður at innflyta gitnaðarevni uttan kravt innflutningsloyvi ella kravda heilsuváttan.
*Stk. 4.* Í samráð við djóraeigaran ger Heilsufrøðiliga starvsstovan av, um gitnaðarevni annaðhvørt skal sendast aftur til sendaralandið, um veterineri myndugleikin í sendaralandinum gevur loyvi til tess, ella skal burturbeinast.

## 8. kapittul
## Fyrisitingarligar ásetingar, ásetingar um kæru og revsireglur

### *Heimildir landsdjóralæknans*

**§ 40.** Landsdjóralæknin kann í serligum førum, eftir eina ítøkiliga váðameting, banna innflutningi úr einum og hvørjum landi.
*Stk. 2.* Landsdjóralæknin kann í serligum føri í eitt styttri tíðarskeið seta aðrar treytir fyri koppseting, neutraliserandi andevnistitrering og viðgerð fyri innflutning av djórum úr londum í flokki A og B, sbr. skjal 1, enn ásett er í hesi kunngerð.
*Stk. 3.* Landsdjóralæknin ásetur treytirnar fyri innflutning av djórum úr londum, sum ikki eru nevnd í skjali 1.

*Gjøld*

**§ 41.** Djóraeigari rindar allar útreiðslur í sambandi við innflutning og eftirlit við djórum og gitnaðarevnum.

*Kæra*

**§ 42.** Avgerðir, tiknar við heimild í hesi kunngerð, kunnu kærast til Vinnukærunevndina, sum tekur endaliga fyrisitingarliga avgerð í málinum. Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, at avgerðin er fráboðað.

*Revsing*

**§ 43.** Um ikki hægri revsing er uppiborin eftir aðrari lóggávu, verður við sekt revsaður tann, sum brýtur ásetingarnar í § 2, § 3, § 4, stk. 1-3, §§ 5-6, § 7, stk. 1 og 5, §§ 9-11, § 12, stk. 1-2, § 22, stk. 1-2, § 25, stk. 1-2, §§ 26-27, § 28, stk. 1, § 29, stk. 1, § 30, stk. 1, § 31, stk. 1, § 32, § 33, stk. 1-3, og § 34.

*Stk. 2.* Revsiábyrgd kann verða áløgd løgfrøðiligum persónum eftir reglunum í 5. kapitli í revsilógini.

*Stk. 3.* Verður eitt brot ikki mett at hava við sær harðari revsing enn sekt, kann Heilsufrøðiliga starvsstovan boða frá, at málið kann verða gjørt av uttan rættarsókn, um tann, sum hevur framt brotið, játtar seg sekan í brotinum og váttar innan eina nærri ásetta freist, ið eftir umsókn kann verða longd, at rinda eina í fráboðanini ásetta sekt.

*Gildiskoma*

**§ 44.** Henda kunngerð kemur í gildi 15. desember 2020, og samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 15 frá 7. apríl 2004 um innflutning av hundum, kettum og øðrum kelidjórum.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, dagfesting

**Helgi Abrahamsen**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

**Skjal 1**

**Listi yvir lond**

**Lond í flokki A:**
Danmark (undantikið Grønland), Finnland, Írland, Ísland, Norra (undantikið Svalbard), Stóra Bretland og Svøríki.

**Lond í flokki B:**
Belgia, Bulgaria, Estland, Frankaríki, Grikkaland, Gr. Kýpros, Grønland, Italia, Kekkia, Kroatia, Lettland, Liktinstein, Litava, Luksemborg, Malta, Niðurlond, Pólland, Portugal, Rumenia, Slovakia, Slovenia, Spania, Svalbard, Sveis, Týskland, Ungarn og Eysturríki.

Skjal 2

**Umsóknarblað**
**Innflutningsloyvi til hund úr landi úr flokki A til Føroya**

| | | |
|---|---|---|
| **Djóraeigari** | Navn | |
| | Bústaður | |
| | Postnummar, býur | |
| | Land | **Føroyar** |
| | Telefonnummar | |
| | Teldupostur | |
| **Upplýsingar um hundin** | Hundaslag | |
| | Føðingardagur | |
| | Kyn | |
| | Eyðmerkingarnummar | |
| **Annað** | Sendaraland | |
| | Øll lond, har hundurin hevur verið seinastu seks mánaðirnar | |
| | Ferðaleið (Øll lond ávegis til Føroya) | |
| | Fráfaringarstaður | |
| | Fráfaringardagur og fráfaringartíð | |
| | Væntaður komudagur | |

Staður Dagur Undirskrift djóraeigarans

Eyðmerkingarnummar hjá hundinum________________

**Koppsetingarváttan**

Galdandi koppsetingar og endurkoppsetingar skulu verða gjørdar sambært tilráðing frá tí, ið hevur framleitt koppingarevnið. Fyrstu koppsetingarnar, ella ov seinar endurkoppsetingar, skulu verða minst fýra vikur gamlar, áðrenn hundurin kemur til Føroya.
Hundahvølpar skulu vera í minsta lagi 12 vikur gamlir, tá ið teir verða koppsettir.

| Koppseting fyri | Koppsetingar-dagur[1] | Galdandi til | Koppingarevni | Framleiðslunummar |
|---|---|---|---|---|
| Hundaøði (Rabies) | | | | |
| | | | | |
| Hundasjúku (Canine distemper) | | | | |
| | | | | |
| Canine parainfluenza-virus | | | | |
| | | | | |
| Livrasótt (Infectious canine hepatitis) | | | | |
| | | | | |
| Canine parvovirus | | | | |
| | | | | |
| Leptospirosu (Leptospirosis) | | | | |
| | | | | |

[1] Fyri endurkoppseting, ið er givin til tíðina, skal eisini dagfesting og gildi fyri seinastu koppseting upplýsast.

Undirritaði løggildur djóralækni váttar við hesum, at omanfyri nevndi hundur er koppsettur við hesum koppingarevnum hesar dagar. Somuleiðis verður váttað, um talan er um hundahvølp, at hvølpurin var í minsta lagi 12 vikur gamal, tá ið hann varð koppsettur.

Staður | Dagur | Undirskrift djóralæknans | Stempul

**GG**. Undirskrivaða umsóknarskjalið skal sendast til Heilsufrøðiligu starvsstovuna, Smyrilsvegur 7, FO-100 Tórshavn, ella við telduposti til hfs@hfs.fo.

Umsóknarskjalið skal vera Heilsufrøðiligu starvsstovuni í hendi **í seinasta lagi seks yrkadagar**, **áðrenn** ferðin til Føroya byrjar.

**Skjal 3**

**Umsóknarblað**
**Innflutningsloyvi til kettu úr landi úr flokki A til Føroya**

| | | |
|---|---|---|
| **Djóraeigari** | Navn | |
| | Bústaður | |
| | Postnummar, býur | |
| | Land | **Føroyar** |
| | Telefonnummar | |
| | Teldupostur | |
| **Upplýsingar um kettuna** | Kettuslag | |
| | Føðingardagur | |
| | Kyn | |
| | Eyðmerkingarnummar | |
| **Annað** | Sendaraland | |
| | Øll lond, har kettan hevur verið seinastu seks mánaðirnar | |
| | Ferðaleið (øll lond ávegis til Føroya) | |
| | Fráfaringarstaður | |
| | Fráfaringardagur og fráfaringartíð | |
| | Væntaður komudagur | |

Staður Dagur Undirskrift djóraeigarans

Eyðmerkingarnummar hjá kettuni____________________
**Koppsetingarváttan**

Galdandi koppsetingar og endurkoppsetingar skulu verða gjørdar sambært tí, ið hevur framleitt koppingarevnið. Fyrstu koppsetingarnar ella ov seinar endurkoppsetingar, skulu verða minst fýra vikur gamlar, áðrenn kettan kemur til Føroya.

Kettlingar skulu vera í minsta lagi 12 vikur gamlir, tá ið teir verða koppsettir.

| **Koppseting fyri** | **Koppsetingar-dagur**[1] | **Galdandi til** | **Koppingarevni** | **Framleiðslunummar** |
|---|---|---|---|---|
| **Hundaøði (Rabies)** | | | | |
| | | | | |
| **Kettusjúku (Feline panleukopenia)** | | | | |
| | | | | |
| **Feline viral rhinotracheitis** | | | | |
| | | | | |
| **Feline calicivirus** | | | | |
| | | | | |
| **Feline leukaemia virus** | | | | |
| | | | | |

[1] Fyri endurkoppseting, ið er givin til tíðina, skal eisini dagfesting og gildi fyri seinastu koppseting upplýsast.

Undirritaði løggildur djóralækni váttar við hesum, at omanfyri nevnda ketta er koppsett við hesum koppingarevnum hesar dagar. Somuleiðis verður váttað, um talan er um kettling, at kettlingurin var í minsta lagi 12 vikur gamal, tá ið hann varð koppsettur.

Staður Dagur Undirskrift djóralæknans Stempul

**GG**. Undirskrivaða umsóknarskjalið skal sendast til Heilsufrøðiligu starvsstovuna, Smyrilsvegur 7, FO-100 Tórshavn, ella við telduposti til hfs@hfs.fo

Umsóknarskjalið skal verða Heilsufrøðiligu starvsstovuni í hendi **í seinasta lagi seks yrkadagar, áðrenn** ferðin til Føroya byrjar.

**Skjal 4**

**Umsóknarblað**
**Innflutningsloyvi til hund úr landi úr flokki B til Føroya**

| | | |
|---|---|---|
| **Djóraeigari** | Navn | |
| | Bústaður | |
| | Postnummar, býur | |
| | Land | **Føroyar** |
| | Telefonnummar | |
| | Teldupostur | |
| **Upplýsingar um hundin** | Hundaslag | |
| | Føðingardagur | |
| | Kyn | |
| | Eyðmerkingarnummar | |
| **Annað** | Sendaraland | |
| | Øll lond, har hundurin hevur verið seinastu seks mánaðirnar | |
| | Ferðaleið (øll lond ávegis til Føroya) | |
| | Fráfaringarstaður | |
| | Fráfaringardagur og fráfaringartíð | |
| | Væntaður komudagur | |

____________________________________________________
Staður Dagur Undirskrift djóraeigarans

Eyðmerkingarnummar hjá hundinum____________________

**Koppsetingarváttan**

Galdandi koppsetingar og endurkoppsetingar skulu verða gjørdar sambært tí, ið hevur framleitt koppingarevnið. Fyrstu koppsetingarnar ella ov seinar endurkoppsetingar, skulu tó verða minst fýra vikur gamlar, áðrenn hundurin kemur til Føroya.

Hundahvølpar skulu vera í minsta lagi 12 vikur gamlir, tá ið teir verða koppsettir.

| **Koppseting fyri** | **Koppsetingar-dagur**[1] | **Galdandi til** | **Koppingarevni** | **Framleiðslunummar** |
|---|---|---|---|---|
| **Hundaøði (Rabies )** | | | | |
| | | | | |
| **Hundasjúku (Canine distemper)** | | | | |
| | | | | |
| **Canine para-influenzavirus** | | | | |
| | | | | |
| **Livrasótt (Infectious canine hepatitis)** | | | | |
| | | | | |
| **Canine parvovirus** | | | | |
| | | | | |
| **Leptospirosu (Leptospirosis)** | | | | |
| | | | | |

[1] Fyri endurkoppseting, ið er givin til tíðina, skal eisini dagfesting og gildi fyri seinastu koppseting upplýsast.

Undirritaði løggildur djóralækni váttar við hesum, at omanfyri nevndi hundur er koppsettur við hesum koppingarevnum hesar dagar. Somuleiðis verður váttað, um talan er um hundahvølp, at hvølpurin var í minsta lagi 12 vikur gamal, tá ið hann varð koppsettur.

________________________________________________

Staður Dagur Undirskrift djóralæknans Stempul

Eyðmerkingarnummar hjá hundinum____________________

**Neutraliserandi andevnistitrering fyri hundaøði (rabies)**
Skal váttast av einum embætisdjóralækna í sendaralandinum.

Ein blóðroynd av omanfyrinevnda hundi er kannað á einari ES-góðkendari kanningarstovu. Blóðroyndin varð tikin tann______________ (dd/mm/áá), sum er minst fýra vikur eftir seinastu koppseting fyri hundaøði.

Undirritaði embætisdjóralækni hevur fingið skrivligt úrslit av kanningini, og hetta vísti eitt úrslit upp á minst 0,5 IE/ml.

| Staður | Dagur | Undirskrift embætisdjóralæknans | Stempul |
|---|---|---|---|

**GG**. Undirskrivaða umsóknarskjalið skal sendast til Heilsufrøðiligu starvsstovuna, Smyrilsvegur 7, FO-100 Tórshavn, ella við telduposti til hfs@hfs.fo

Umsóknarskjalið skal verða Heilsufrøðiligu starvsstovuni í hendi **í seinasta lagi seks yrkadagar, áðrenn** ferðin til Føroya byrjar.

**Skjal 5**

**Umsóknarblað**
**Innflutningsloyvi til <u>kettu</u> úr landi úr flokki B til Føroya**

| | | |
|---|---|---|
| **Djóraeigari** | Navn | |
| | Bústaður | |
| | Postnummar, býur | |
| | Land | **Føroyar** |
| | Telefonnummar | |
| | Teldupostur | |
| **Upplýsingar um kettuna** | Kettuslag | |
| | Føðingardagur | |
| | Kyn | |
| | Eyðmerkingarnummar | |
| **Annað** | Sendaraland | |
| | Øll lond, har kettan hevur verið seinastu seks mánaðirnar | |
| | Ferðaleið (øll lond ávegis til Føroya) | |
| | Fráfaringarstaður | |
| | Fráfaringardagur og fráfaringartíð | |
| | Væntaður komudagur | |

______________________________________________

Staður Dagur Undirskrift djóraeigarans

Eyðmerkingarnummar hjá kettuni____________________

**Koppsetingarváttan**

Galdandi koppsetingar og endurkoppsetingar skulu verða gjørdar sambært tilráðing frá tí, ið hevur framleitt koppingarevnið. Fyrstu koppsetingarnar ella ov seinar endurkoppsetingar, skulu tó verða minst fýra vikur gamlar, áðrenn kettan kemur til Føroya.

Kettlingar skulu vera í minsta lagi 12 vikur gamlir, tá ið teir verða koppsettir.

| Koppseting fyri | Koppsetingar-dagur[1] | Galdandi til | Koppingarevni | Framleiðslunummar |
|---|---|---|---|---|
| Hundaøði (Rabies ) | | | | |
| | | | | |
| Kettusjúku (Feline panleukopenia) | | | | |
| | | | | |
| Feline viral rhinotracheitis | | | | |
| | | | | |
| Feline calicivirus | | | | |
| | | | | |
| Feline leukaemia virus | | | | |
| | | | | |
| | | | | |

[1] Fyri endurkoppseting, ið er givin til tíðina, skal eisini dagfesting og gildi fyri seinastu koppseting upplýsast.

Undirritaði løggildur djóralækni váttar við hesum, at omanfyri nevnda ketta er koppsett við hesum koppingarevnum hesar dagar. Somuleiðis verður váttað, um talan er um kettling, at kettlingurin var í minsta lagi 12 vikur gamal, tá ið hann varð koppsettur.

Staður Dagur Undirskrift djóralæknans Stempul

Eyðmerkingarnummar hjá kettuni__________________

**Neutraliserandi andevnistitrering fyri hundaøði (rabies)**
Skal váttast av einum embætisdjóralækna í sendaralandinum.

Ein blóðroynd av omanfyri nevndu kettu er kannað á einari ES-góðkendari kanningarstovu. Blóðroyndin varð tikin tann_____________ (dd/mm/áá), sum er minst fýra vikur eftir seinastu koppseting fyri hundaøði.
Undirritaði embætisdjóralækni hevur fingið skrivligt úrslit av kanningini, og hetta vísti eitt úrslit upp á minst 0,5 IE/ml.

| Staður | Dagur | Undirskrift embætisdjóralæknans | Stempul |
|---|---|---|---|

**GG**. Undirskrivaða umsóknarskjalið skal sendast til Heilsufrøðiligu starvsstovuna, Smyrilsvegur 7, FO-100 Tórshavn, ella við telduposti til hfs@hfs.fo

Umsóknarskjalið skal verða Heilsufrøðiligu starvsstovuni í hendi **í seinasta lagi seks yrkadagar, áðrenn** ferðin til Føroya byrjar.

**Skjal 6**

**Heilsuváttan**

**fyri hund/kettu, sum skal innflytast til Føroya úr landi úr flokki A ella B**

Heilsuváttanin skal ikki vera eldri enn tveir dagar, tá ið ferðin hjá djórinum til Føroya byrjar. Heilsuváttanin skal verða víst Heilsufrøðiligu starvsstovuni ella tollmyndugleikanum, tá djórið kemur til Føroya.

Eyðmerkingarnummar hjá djórinum:____________________________

**Heilsuváttan**

Undirritaði løggildur djóralækni váttar við hesum at hava gjørt eina nærlagda kliniska kanning av omanfyri nevnda djóri í dag.

Undir kanningini hevði áðurnevnda djór eingi klinisk tekin um smittandi sjúku og er eftir míni meting egnað til flutning millum lond.

**Viðgerð fyri sníkar**

Viðgerast skal fyri niðanfyri nevndu innansníkar og uttansníkar.

Undirritaði løggildur djóralækni váttar við hesum, at omanfyri nevnda djór er viðgjørt fyri sníkar við hesum evnum:

| **Viðgjørt fyri** | **Viðgerðar-dagur** | **Navn á heilivági** | **Virkið evni** | **Skamtur** |
|---|---|---|---|---|
| ***Echinococcus* spp.** | | | | |
| **Bendilorm** | | | | |
| **Rundorm** | | | | |
| **Franskan hjartaorm** (bert fyri hund) | | | | |
| **Lús** | | | | |
| **Loppu** | | | | |
| **Skrubb** | | | | |
| **Skógarmottu** | | | | |

Staður Dagur Undirskrift djóralæknans Stempul

**Váttan frá embætisdjóralækna – Bert úr landi úr flokki B**

Undirritaði embætisdjóralækni váttar við hesum, at omanfyri nevnda djór ikki kemur frá landi ella øki, har veterinerar avmarkingar eru settar í verk, orsakað av smittandi djórasjúku.

Staður Dagur Undirskrift embætisdjóralæknans Stempul

**Skjal 7**

**Innflutningsloyvi til hund/kettu til Føroya**

| | | |
|---|---|---|
| **Djóraeigari** | Navn | |
| | Bústaður | |
| | Postnummar, býur | |
| | Land | **Føroyar** |
| | Telefonnummar | |
| | Teldupostur | |
| **Upplýsingar um djórið** | Hunda-/kettuslag | |
| | Eyðmerkingarnummar | |
| **Annað** | Ferðaleið (øll lond ávegis til Føroya) | |

**Heilsufrøðiliga starvsstovan gevur við hesum loyvi til, at omanfyri nevnda djór verður innflutt til Føroya. Innflutningsloyvið er galdandi frá**

______________ **til** ______________

Staður ______ Dagur ______ Undirskrift embætisdjóralæknans ______ Stempul

*Verður útfylt av flutningsfelagnum, áðrenn loyvt verður djórinum umborð í flutningsfarið*

Staður ______ Dagur ______ Váttan flutningsfelagsins ______ Stempul

*Verður útfylt av tollvaldinum í Føroyum*

*Komudagur:* *Flutningsfar:*

______________

*Undirskrift* *Stempul*

**GG.** Innflutningsloyvi **skal** verða víst Heilsufrøðiligu starvsstovuni ella tollmyndugleikanum, tá ið djórið kemur til Føroya.

**Skjal 8**

**Umsóknarblað**

**Innflutningsloyvi til gitnaðarevni frá hundi úr landi úr flokki A ella B til Føroya**

| | | |
|---|---|---|
| **Eigari av gevara-hundinum** | Navn | |
| | Bústaður | |
| | Postnummar, býur | |
| | Land | |
| | Telefonnummar | |
| | Teldupostur | |
| **Innflytari í Føroyum (djóraeigari)** | Navn | |
| | Bústaður | |
| | Postnummar, býur | |
| | Land | **Føroyar** |
| | Telefonnummar | |
| | Teldupostur | |
| **Upplýsingar um gevara-hundin** | Hundaslag | |
| | Føðingardagur | |
| | Eyðmerkingarnummar | |
| | Slag av gitnaðarevni | |
| **Annað** | Sendaraland | |
| | Øll lond, har gevarahundurin hevur verið teir seinastu seks mánaðirnar | |

Staður Dagur Undirskrift eigarans av gevarahundinum

Eyðmerkingarnummar hjá gevarahundinum:__________________

**Koppsetingarváttan fyri gevarahundin**

Galdandi koppsetingar og endurkoppsetingar skulu verða gjørdar sambært tilráðing frá tí, ið hevur framleitt koppingarevnið. Fyrstu koppsetingarnar ella ov seinar endurkoppsetingar skulu verða gjørdar minst fýra vikur fyri tøku av gitnaðarevnunum.

| Koppseting fyri | Koppsetingar-dagur[1] | Galdandi til | Koppingarevni | Framleiðslunummar |
|---|---|---|---|---|
| **Hundaøði (Rabies)** | | | | |
| | | | | |
| **Hundasjúku (Canine distemper)** | | | | |
| | | | | |
| **Canine para-influenzavirus** | | | | |
| | | | | |
| **Livrasótt (Infectious canine hepatitis)** | | | | |
| | | | | |
| **Canine parvovirus** | | | | |
| | | | | |
| **Leptospirosu (Leptospirosis)** | | | | |
| | | | | |

[1] Fyri endurkoppseting, ið er givin til tíðina, skal eisini dagfesting og gildi fyri seinastu koppseting upplýsast.

Undirritaði løggildur djóralækni váttar við hesum, at omanfyri nevndi hundur er koppsettur við hesum koppingarevnum hesar dagar.

Staður Dagur Undirskrift djóralæknans Stempul

Eyðmerkingarnummar hjá gevarahundinum__________________

# Bert galdandi fyri gitnaðarevni úr landi úr flokki B

**Neutraliserandi andevnistitrering fyri hundaøði (rabies)**
Skal váttast av einum embætisdjóralækna í sendaralandinum.

Ein blóðroynd av omanfyri nevnda gevarahundi er kannað á einari ES-góðkendari kanningarstovu.

Blóðroyndin varð tikin tann______________ (dd/mm/áá), sum er minst fýra vikur eftir seinastu koppseting fyri hundaøði.

Undirritaði embætisdjóralækni hevur fingið skrivligt úrslit av kanningini, og hetta vísti eitt úrslit upp á minst 0,5 IE/ml.

| Staður | Dagur | Undirskrift embætisdjóralæknans | Stempul |
|---|---|---|---|

**GG.** Undirskrivaða umsóknarskjalið skal sendast til Heilsufrøðiligu starvsstovuna, Smyrilsvegur 7, FO-100 Tórshavn, ella við telduposti til hfs@hfs.fo.

Umsóknarskjalið skal verða Heilsufrøðiligu starvsstovuni í hendi **í seinasta lagi seks yrkadagar, áðrenn** ferðin til Føroya byrjar.

**Skjal 9**

**Umsóknarblað**

**Innflutningsloyvi til gitnaðarevni frá kettu úr landi úr flokki A ella B til Føroya**

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Eigari av gevara-kettuni** | Navn | | |
| | Bústaður | | |
| | Postnummar, býur | | |
| | Land | | |
| | Telefonnummar | | |
| | Teldupostur | | |
| **Innflytari í Føroyum (kettueigari)** | Navn | | |
| | Bústaður | | |
| | Postnummar, býur | | |
| | Land | | **Føroyar** |
| | Telefonnummar | | |
| | Teldupostur | | |
| **Upplýsingar um kettuna** | Kettuslag | | |
| | Føðingardagur | | |
| | Eyðmerkingarnummar | | |
| | Slag av gitnaðarevni | | |
| **Annað** | Sendaraland | | |
| | Øll lond, har gevaradjórið hevur verið seinastu seks mánaðirnar | | |

Staður Dagur Undirskrift eigarans av gevarakettuni

Eyðmerkingarnummar hjá gevarakettuni:_______________

**Koppsetingarváttan fyri gevarakettuna**

Galdandi koppsetingar og endurkoppsetingar skulu verða gjørdar sambært tilráðing frá tí, ið hevur framleitt koppingarevnið. Fyrstu koppsetingarnar ella ov seinar endurkoppsetingar, skulu verða gjørdar minst fýra vikur fyri tøku av gitnaðarevnunum.

| Koppseting fyri | Koppsetingar-dagur[1] | Galdandi til | Koppingarevni | Framleiðslunummar |
|---|---|---|---|---|
| Hundaøði (Rabies) | | | | |
| | | | | |
| Kettusjúku (Feline panleukopenia) | | | | |
| | | | | |
| Feline viral rhinotracheitis | | | | |
| | | | | |
| Feline calicivirus | | | | |
| | | | | |
| Feline leukaemia virus | | | | |
| | | | | |

[1] Fyri endurkoppseting, ið er givin til tíðina, skal eisini dagfesting og gildi fyri seinastu koppseting upplýsast.

Undirritaði løggildur djóralækni váttar við hesum, at omanfyri nevnda ketta er koppsett við hesum koppingarevnum hesar dagar.

Staður Dagur Undirskrift djóralæknans Stempul

**GG**. Undirskrivaða umsóknarskjalið skal sendast til Heilsufrøðiligu starvsstovuna, Smyrilsvegur 7, FO-100 Tórshavn, ella við telduposti til hfs@hfs.fo.

Umsóknarskjalið skal verða Heilsufrøðiligu starvsstovuni í hendi **í seinasta lagi seks yrkadagar**, **áðrenn** ferðin til Føroya byrjar.

Eyðmerkingarnummar hjá gevarakettuni____________________

# Bert galdandi fyri gitnaðarevni úr landi úr flokki B

**Neutraliserandi andevnistitrering fyri hundaøði (rabies)**
Skal váttast av einum embætisdjóralækna í sendaralandinum.

Ein blóðroynd av omanfyri nevndu gevarakettu er kannað á einari ES-góðkendari kanningarstovu.

Blóðroyndin varð tikin tann_____________ (dd/mm/áá), sum er minst fýra vikur eftir seinastu koppseting fyri hundaøði.

Undirritaði embætisdjóralækni hevur fingið skrivligt úrslit av kanningini, og hetta vísti eitt úrslit upp á minst 0,5 IE/ml.

| Staður | Dagur | Undirskrift embætisdjórlæknans | Stempul |
|---|---|---|---|

**Skjal 10**

**Heilsuváttan**

**fyri gevaradjór og gitnaðarevni, sum skulu innflytast til Føroya**

Eyðmerkingarnummar hjá gevaradjórinum:______________________

**Heilsuváttan**

Undirritaði løggildur djóralækni váttar við hesum á tøkudegnum at hava gjørt eina nærlagda kliniska kanning av omanfyri nevnda gevaradjóri.

Undir kanningini hevði omanfyri nevnda gevaradjór eingi klinisk tekin um smittandi sjúku.

**Eyðmerking av gitnaðarevnum**

| Eyðmerking | Tøkudagur |
|---|---|
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |

Samlað tal av eindum:____________
Undirritaði løggildur djóralækni váttar við hesum at hava tikið omanfyri nevndu gitnaðarevni samsvarandi eyðmerkingarnar.

______________________________________________________________

Staður | Dagur | Undirskrift djóralæknans | Stempul

**GG.** Heilsuváttanin skal útfyllast í sambandi við tøku av gitnaðarevni. Heilsuváttanin skal verða víst Heilsufrøðiligu starvsstovuni ella tollmyndugleikanum, tá gitnaðarevnið kemur til Føroya.

**Skjal 11**

**Innflutningsloyvi**

**til gitnaðarevni til Føroya**

| | | |
|---|---|---|
| **Innflytari (Djóraeigari)** | Navn | |
| | Bústaður | |
| | Postnummar, býur | |
| | Land | **Føroyar** |
| | Telefonnummar | |
| | Teldupostur | |
| **Upplýsingar um gevara-djórið** | Djóraslag | |
| | Eyðmerkingarnummar | |
| **Annað** | Sendaraland | |
| | Ferðaleið | |

**Heilsufrøðiliga starvsstovan gevur við hesum loyvi til, at omanfyri nevnda gitnaðarevni verður innflutt til Føroya.**

**Innflutningsloyvið er galdandi frá ____________ til _____________**

Staður | Dagur | Undirskrift embætisdjóralæknans | Stempul

*Verður útfylt av tollvaldinum í Føroyum*

*Komudagur* | *Flutningsfar*

*Undirskrift* | *Stempul*

**GG:** Innflutningsloyvið **skal** verða víst Heilsufrøðiligu starvsstovuni ella tollmyndugleikanum, tá gitnaðarevnið kemur til Føroya